# 6. oktober traumet

JØRN ASTRUP HANSEN
Formand for Búskaparráðið



Kapitaliseringen af fiskerettighederne har ført til en betydelig gældsætning af erhvervet. Men der er ikke grundlag for at drage paralleller til den 6. oktober 1992.

Færøsk økonomi, der brød sammen i 1992, har siden 1995 været i fremgang, omend fremgangen i perioder har været mindre udtalt. Efter katastrofen i 1992 og den lange, ubrudte fremgang synes en vis dødsdrift at have grebet dele af pressen. Tom Kristensen udtrykker det i sin selvbiografiske roman om journalisten Ole Jastrau således: *Jeg har længtes mod Skibskatastrofer og Hærværk og pludselig Død*. (Hærværk; 1930).

Såfremt man over for pressen tager forbehold for, eller sætter spørgsmålstegn ved, den økonomiske udvikling, fremmanes straks skrækscenariet fra den 6. oktober 1992. Der er behov for at nuancere billedet. Et rutinemæssigt tilbageslag i økonomien, som fra tid til anden med stor sandsynlighed rammer enhver økonomi - og med sikkerhed en enstrenget økonomi som den færøske - er da ikke ensbetydende med et økonomisk sammenbrud.

I Portalen den 15. d.m. referer Sosialurin mig for at have advaret om, at *Føroyar kunnu vera á veg ímóti einum skrædli, som verður verri enn tað í 1992, tá bankarnir fóru á heysin*. En fjer er blevet til fem høns.

Jeg har i et interview peget på den finansielle risiko, der er en konsekvens af, at fiskerettighederne er blevet privatiseret. Når et fiskeskib eller et rederi skifter ejer, sker der en kapitalisering af fiskerettighederne; kapitalen trækkes ud af erhvervet. Det gælder også, selv om ejerskiftet alene er af formel karakter. Jeg har peget på, at netop i relation til fiskerettighederne adskiller situationen sig i dag - til det værre - fra situationen i 1992.

Adgangen til fiskeriet var i princippet fri i 1992. Alene af den grund havde fiskerettighederne ikke nogen selvstændig værdi. Følgelig var der ikke noget at kapitalisere.

Anderledes under lov om erhvervsmæssigt fiskeri, som begrænser adgangen til fiskeriet. Retten til at fiske er blevet et knapt gode. Og knappe goder har en værdi - en værdi, som efter omstændighederne kapitaliseres.

Men fiskerettigheder repræsenterer en flygtig værdi. Fiskeriet påvirkes af biologiske forhold, som Tinganes kun har ringe indflydelse på; verdensmarkedspriserne på fisk - og olie - kan vende op ned på økonomien i erhvervet; det samme kan internationale kvoteringsaftaler; og en stigende rente kan tvinge et erhverv med heftigt belånte fiskerettigheder i knæ. Men et sammenbrud i markedet for fiskerettigheder vil ikke føre nogen 6. oktober med sig. Men en mindre ulykke (end 6. oktober) kan jo også være slem nok. Især da, hvis ulykken kunne have været undgået ved rettidig omhu og en mere hensigtsmæssig fiskeriforvaltning.

Den 6. oktober var konsekvensen af et svigtende fiskeri og en katastrofal økonomisk politik. Subsidierne, landsstyregarantierne og rentebeskatningen kunne hver for sig have bragt økonomien i knæ. Til sammen førte de med usvigelig sikkerhed Færøerne ud i katastrofen.

Men subsidierne er reduceret kraftigt, landsstyregarantierne er væk, og den særfærøske rentebeskatning er bragt til ophør. En finansiel krise i fiskeriet som følge af en uhensigtsmæssig administration af fiskerettighederne vil gøre ondt. I erhvervet - og i samfundet.

Men den vil ikke føre til en 6. oktober.

# Tøkk til Olav Enomoto

JÓHAN HERI JOENSEN

Olav Enomoto og allir tit sum stemmaðu fyri, takk skulu tit hava fyri, at tit høvdu polittiskan rygg til at taka eina støðu, sum forðaði fyri at Føroya land verður stýrt sum eitt Teokrati (prestastýri).

Tað er nú long tíð síðani, eg skrivaði eitt hvast lesaraskriv móti eini útsøgn sum kom frá einum landsstýrismanni um tey samkyndu. Har sagt varð, at Føroya fólk ikki skuldi fáa innivist í Himli tí vit góðtóku hesar syndarar. Hetta var vist eitt av fyrstu skrivum í hesum kjaki, sum við tíðini er farið fullkomuliga av sporinum.

Havi fylgt við orðaskiftinum um tey samkyndu og sæð, hvussu ábyrgdarleysir politiskir stemmufiskarar hava misnýtt tað heilagu skriftina sum amboð í teirra stemmufiskaríið.

Eg havi ikki viljað lagt uppí aftur kjakið, av teirri grund:

**Hetta er eitt lítið mál, sum ávísir bólkar, á báðum síðum, hava blást upp til meira enn tað er**. Men eg frøist yvir, at vit í Føroyum í dag eru so mikið at okkum komin, at vit geva øllum borgarum somu rættindir at liva í hesum landi.

Táið málið varð avgreitt í tinginum, varð tað onkur politikari sum segði, at kristnitrúgvin hevði tapt.

**Nei. Jesus Kristus tapir ikki**.

Tey sum taptu vóru: tey sum fundamentalt lesa heilagu skriftirnar komma fyri komma og brúka ymsu skriftstøðini sum eitt puslispæl, til egnan fyrimun.

Eisini kunnu vit lovprísa, at **Teokratiðið**, fekk skot fyri bógvin.

Har Teokrati ræður fyri borgum vita vit, hvussu statt er. Vit hoyra dagliga um rætttrúgvandi sum sproyngja seg í luftina í trúðarinnar navnið.

Tann gávan vit hava fingið frá Skaparanum, og sum skilir okkum frá djórunum annars á jarðarklótuni er heili okkara, og hann eigur at nýtast – og ikki koblast frá táið okkurt skriftstað kemur í vegin – ella tí vit politiskt skulu bjarga nøkrum stemmum. At noktað at nýta tað størstu gávuna sum Gud hevur givið okkum haldi eg er størsta háðanin móti Skaparanum og skaparaverkinum sum heild.

Sum lærari verði eg dagliga eisini konfronteraður við hesa syndarligu støðu, tá ið tosað verður um, hvussu alt lív á jørðini er vorið til. Nevnir tú Darwin, so fært tú eisini innlit í, hvussu ungdómur okkara verður stýrdur (inndoktrineraður).

At hoyra hvussu meinaleys børn tvíhalda uppá eina skapanarsøgu, sum bert er nøkur túsund ára gomul, fær meg at øtast.

Eg takki mínum Gudi og Frelsara fyri tað bestu gávuna hann hevur givið mær og nýti hana eisini eftir førimuni og góðtaki eisini, at náttúran er so háttað, at peran er farin at kámast, nú aldurin vísir seg. Men hettar er eisini ein partur av skapanarsøguni og teimum fortreytum vit hava fingið í vøggugávu.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

# Viðmerkingar til grein hjá Hans Paula Strøm, landsstýrismanni í almannamálum

VEGNA LANDSFELAG PENSJÓNISTA
Niclas Akraberg Poulsen, formaður

Grein, ið hevði yvirskrivtina "Eftir skatt er føroyska pensjónin farin upp um ta donsku" ið varð partvíst endurgivin í Útvarpi Føroya og prentað í Sosialinum og Dimmalætting hin 13. desember 2006.

Greinin er óbeinleiðis svar uppá opið skriv sum Landsfelag Pensjónista lat Jóanes Eidesgaard, løgmanni, politisku flokkunum og fjølmiðlunum, mánadagin hin 11. desember 2006. Landsfelagið metir, at nevnda grein/frágreiðing hjá Hans Paula Strøm, landsstýrismanni í almannamálum hevur fleiri sjónligar manglar.

Líkt er til, at landsstýrismaðurin heldur, at Landsfelag Pensjónista bert tosar um føroysku fólka-pensjónina anno 2006. So er ikki, landsfelagið vil fegið hava greiðu á, hvussu nógv føroysku pensjónirnar eru dragnaðar í mun til donsku pensjónina síðan 1988, tá Fólkatingslóg nr. 717 frá 18. desember ásetti at..."**der sikres samme disponiple indkomst til pensjonsmodtagere på Færøerne og i Danmark"**.

Vert er at býta merki í, at Hans Pauli Strøm telur samhaldsfasta við í føroysku fólkapensjónina, meðan hann hinvegin ikki telur donsku ATP-skipanina (arbejdsmarkedets tillægs pension) við í donsku fólkapensjónina. Okkum kunnugt fáa flestu danir útgjald frá ATP-skipanini, tá teir gerast 65 ár og tey fáu sum ikki fáa útgjald ella bert fáa lágt útgjald frá ATP-skipanini fáa sonevndan Eldrakekk frá tí almenna. Somuleiðis er undrunarvert at landsstýrismaðurin tekur viðbót til ávísar pensjónistar (sonevnda brennistudningin) við í uppgerðina av føroysku fólkapensjónini, meðan brennistuðulin, sum danski staturin veitir donskum fólkapensjónistum, ikki verður tikin við í uppgerðina yvir donsku fólkapensjónina.

Hans Pauli Strøm nevnir, at hann hevur nýtt uppgerðarhátt hjá Nordisk Socialstatistisk Årbog í sammeting síni av føroysku fólkapensjónini í mun til donsku fólkapensjónina. Men hann kemur hinvegin ikki inn á kanning hjá NOSOSCO (Nordic Social-Stastistical Committee), ið er nevnd undir Norðurlandaráðnum - sum Almanna- og heilsumálaráðið hevur samstarv við – sum hevur almannagjørt kanning, ið vísir, at føroyskir pensjónistar eru munandi verri fyri fíggjarliga enn danskir pensjónistar.

Landsstýrismaðurin nevnir heldur ikki, at danskir pensjónistar fáa peningaligan stuðul til bústaðar/-leigu útreiðslur. Og at fólkapensjónistar, sum fáa varandi viðgerðarkrevjandi sjúku at dragast við, fáa ókeypis uppvenjing frá tí almenna (tað almenna ber kostnaðin av slíkari uppvenjing/viðgerð).

Samanumtikið metir Landsfelag Pensjónista, at innihaldið í nevndu grein, ið viðger fíggjarligu støðuna hjá føroyskum fólkapensjónisum í mun fíggjarligu støðuna hjá donskum fólkapensjónisum, er ov einsíðug og ófullfíggjað og er tískil meira villeiðandi enn uppklárandi.

Vísandi til m.a. omanfyristandi heldur Landsfelag Pensjónista, at tað er umráðandi at Føroya Landsstýri skjótast til ber fær óheftan serfrøðing í fyrisitingarrætti (serfrøðing uttanfyri føroysku miðfyrisitingina) at kanna pensjónsmálið frá 1987 nærri. Hetta soleiðis at hetta pensjónsmál langt um longi kann verða loyst á nøktandi hátt.

Tórshavn, hin 15. desember 2006

